## FISKIVINNUTÍÐINDI

# Gólvuppboðssølan

Gólvsølan

Fríggjadagin seldu138 bátar knapt 100 tons um gólvsøluna hjá Fiskamarknaðinum. Av hesum vórðu 62 tons landaði í Klaksvík, 37 tons á Toftum, meðan knappliga eitt hálvt tons varð landað í Vági

| Syslu-nummar | Skipanavn | Reiðskapur | kilo |
|---|---|---|---|
| FD 79 | HAVØRNIN | SNELLA | 396 |
| FD 102 | BYLGJAN | SNELLA | 417 |
| FD 112 | BARMUR | SNELLA | 1.163 |
| FD 138 | BYRGI | SNELLA | 975 |
| FD 15 | ANNA MARIA | SNELLA | 442 |
| FD 205 | GRETA | SNELLA | 542 |
| FD 216 | SIGGA | SNELLA | 477 |
| FD 219 | SJÓSØKI | SNELLA | 853 |
| FD 222 | GAMLI EDVARD | SNELLA | 384 |
| FD 283 | ÁLITIÐ | SNELLA | 423 |
| FD 296 | JÓGVAN Á BRÚGV | SNELLA | 440 |
| FD 329 | KARIN 3 | SNELLA | 693 |
| FD 348 | SKORATINDUR | SNELLA | 714 |
| FD 355 | FRÍÐA | SNELLA | 629 |
| FD 361 | SÚLAN | SNELLA | 115 |
| FD 377 | JULIA | SNELLA | 1.313 |
| FD 386 | SLÆTTIKLETTUR | SNELLA | 458 |
| FD 406 | ALMA-J | SNELLA | 627 |
| FD 420 | REYNIR | SNELLA | 1.678 |
| FD 437 | MUNKURIN 3 | SNELLA | 791 |
| FD 460 | SAFIR | SNELLA | 1.405 |
| FD 508 | HALGAFELLI | SNELLA | 780 |
| FD 512 | NABBI | SNELLA | 364 |
| FD 553 | BRANDUR | LÍNA | 2.634 |
| FD 571 | DURITA | SNELLA | 657 |
| FD 580 | THOMAS NYGAARD | LÍNA | 306 |
| FD 581 | SIGMUND | LÍNA | 240 |
| FD 588 | FUGLTÚGVAN | LÍNA | 447 |
| FD 65 | EIK HELGADÓTTIR | SNELLA | 754 |
| FD 67 | HULDUSTEINUR | SNELLA | 186 |
| FD 68 | ROYNDIN FRÍÐA | SNELLA | 1.246 |
| FD 750 | BRIMNES | SNELLA | 1.320 |
| FD 771 | KATRIN | SNELLA | 1.571 |
| FD 775 | LANGANES | SNELLA | 467 |
| FD 780 | BAKKAFOSSUR | SNELLA | 637 |
| FD 855 | LÓMUR M/B | SNELLA | 852 |
| FD 89 | HØVDIN | SNELLA | 484 |
| FD 900 | HØVNIN | LÍNA | 981 |
| FD 954 | VØRÐAN | SNELLA | 704 |
| FD1019 | HEGRIN | SNELLA | 367 |
| FD1034 | STJØRNAN | SNELLA | 397 |
| FD1108 | LUNA | SNELLA | 303 |
| FD1110 | ARCTIC | SNELLA | 723 |
| FD1130 | SJÓBÚGVIN | SNELLA | 387 |
| FD1137 | RIVTANGI | SNELLA | 643 |
| FD1144 | NESHAMAR | SNELLA | 263 |
| KG 101 | NEVIÐ | SNELLA | 266 |
| KG 106 | BARIÐ | SNELLA | 519 |
| KG 112 | BLÁABERG | SNELLA | 385 |
| KG 123 | HÁENNI | LÍNA | 2.862 |
| KG 125 | BJARNABERG | SNELLA | 404 |
| KG 127 | SKURÐAKLETTUR | LÍNA | 4.166 |
| KG 129 | BRATTABERG | SNELLA | 670 |
| KG 135 | SVARTBAKUR M/B | SNELLA | 986 |
| KG 155 | OLGAR Í GERÐUM | SNELLA | 116 |
| KG 170 | ELJAN | SNELLA | 541 |
| KG 171 | NÚPISKLETTUR | SNELLA | 438 |
| KG 172 | SYÐRATANGI | SNELLA | 179 |
| KG 23 | NANCY | SNELLA | 169 |
| KG 248 | SJÓSTEINUR | SNELLA | 249 |
| KG 276 | SKORHAMAR | SNELLA | 688 |
| KG 284 | HELLISENDI | LÍNA | 2.636 |
| KG 290 | REYNSENNIÐ | SNELLA | 386 |
| KG 293 | FAGRAENNI | SNELLA | 1.887 |
| KG 296 | GLÆMAN | SNELLA | 437 |
| KG 301 | MÁSASTEINUR | SNELLA | 315 |
| KG 320 | KROSSTEINUR | SNELLA | 290 |
| KG 33 | SYLVIA | SNELLA | 135 |
| KG 335 | SKIPALEITI | SNELLA | 584 |
| KG 347 | MAGNHILD | SNELLA | 181 |
| KG 37 | LION | SNELLA | 324 |
| KG 407 | JØKUL | LÍNA | 1.648 |
| KG 423 | JASPISSTEINUR | SNELLA | 510 |
| KG 430 | BÁRAN | SNELLA | 362 |
| KG 444 | HEIÐABRÚGV | SNELLA | 353 |
| KG 45 | RANDI | SNELLA | 1.152 |
| KG 450 | ALDAN | SNELLA | 239 |
| KG 452 | BEINISSVØRÐ | SNELLA | 261 |
| KG 480 | HVÍTABRÚGV | SNELLA | 367 |
| KG 505 | RIVISTAKKUR | SNELLA | 198 |
| KG 512 | NESHAMAR | SNELLA | 456 |
| KG 514 | DÚGVAN | SNELLA | 551 |
| KG 543 | HALGAFELLI | SNELLA | 585 |
| KG 548 | ELIN H | SNELLA | 538 |
| KG 561 | FAGRIKLETTUR | LÍNA | 670 |
| KG 575 | BIRGIT C. | SNELLA | 665 |
| KG 587 | REYNSMÚLI | LÍNA | 2.301 |
| KG 589 | KALLANES | LÍNA | 2.326 |
| KG 603 | SJÓFRÚGVIN | SNELLA | 378 |
| KG 608 | HERDIS | SNELLA | 198 |
| KG 63 | POLLUR | SNELLA | 89 |
| KG 640 | HANSA | SNELLA | 297 |
| KG 642 | BRAGD | LÍNA | 3.036 |
| KG 661 | RÝPAN | SNELLA | 308 |
| KG 666 | SJÓVARFOSSUR | SNELLA | 362 |
| KG 681 | NESTINDUR | SNELLA | 1.042 |
| KG 7 | JÁKUP B | LÍNA | 769 |
| KG 703 | HENNY | SNELLA | 510 |
| KG 708 | VÁRSÓL | SNELLA | 154 |
| KG 716 | KARIN | SNELLA | 2.284 |
| KG 74 | NESTANGI | SNELLA | 646 |
| KG 740 | HÓPUR | SNELLA | 185 |
| KG 743 | ELSA | SNELLA | 495 |
| KG 744 | OSLA | LÍNA | 1.987 |
| KG 832 | BORGIN | SNELLA | 771 |
| KG 888 | RANNVÁ | SNELLA | 285 |
| KG 92 | ØLDAN | SNELLA | 544 |
| KG 94 | BRID FORD | SNELLA | 880 |
| SA 106 | SVANANES | SNELLA | 298 |
| SA 130 | SYÐRABERG | SNELLA | 320 |
| SA 215 | BIRTU LIAS | SNELLA | 570 |
| SA 26 | BÁRÐARENNI | SNELLA | 432 |
| SA 280 | SNIGÁLVUR | SNELLA | 789 |
| SA 350 | HVESSINGUR | SNELLA | 450 |
| SA 38 | VESTURBERG | SNELLA | 901 |
| TG 10 | EVI | SNELLA | 550 |
| TG 14 | HEYKUR | SNELLA | 119 |
| TG 26 | MAJBRITT | SNELLA | 896 |
| TG 262 | LEIF M. | SNELLA | 331 |
| TG 267 | HVÍTIKLETTUR | SNELLA | 269 |
| TG 349 | TRÝ DRANGUR | SNELLA | 797 |
| TG 401 | BARBARA | SNELLA | 618 |
| TG 576 | SVANUR | SNELLA | 1.337 |
| TG 744 | MARJUN | SNELLA | 388 |
| TG 797 | NORÐFARIÐ | SNELLA | 99 |
| TG 91 | STJØRNAN | SNELLA | 1.382 |
| TN 23 | ESPINGUR | SNELLA | 661 |
| TN 325 | RÁDNI | SNELLA | 674 |
| TN 349 | VÁÐASTEINUR | LÍNA | 77 |
| TN 422 | NÓN | SNELLA | 777 |
| TN 460 | BRATTANES M/B | SNELLA | 137 |
| TN 723 | BRATTASKORÐ | SNELLA | 695 |
| TN 912 | HEINI | SNELLA | 226 |
| VA 213 | LEITISTANGI | SNELLA | 1.267 |
| VA 269 | ANNA MARIA M/B | SNELLA | 1.270 |
| VA 28 | ÁLITIÐ | SNELLA | 1.194 |
| VA 287 | SÓLVÁ | SNELLA | 1.019 |
| VN 430 | RUÐITANGI | SNELLA | 337 |

| Vørunavn | Kilo |
|---|---|
| TOSKUR 2 | 12.831 |
| TOSKUR 3 | 46.108 |
| TOSKUR 4 | 22.352 |
| TOSKUR 5 | 3.207 |
| TOSKAROGN | 5.064 |
| TOSKUR 1 | 2.993 |
| SIL | 1.719 |
| UPSI 0 | 492 |
| HÝSA 1 | 600 |
| HÝSA 2 | 990 |
| HVÍTINGUR 0 | 518 |
| KONGAFISKUR 0 | 92 |
| STEINBÍTUR | 473 |
| HAVTASKA 0 | 208 |
| KALVI 4 | 32 |
| REYÐSPRØKA 0 | 46 |
| KALVI 2 | 11 |
| SKØTA | 260 |
| HÝSA 0 | 3 |
| UPSI 1 | 184 |
| UPSI 2 | 157 |
| UPSI 3 | 221 |
| UPSI 4 | 54 |
| HÝSA 3 | 526 |
| BROSMA 3&4 | 287 |
| LONGA 4&5 | 65 |
| SKRUBBA | 25 |
| LIVUR | 87 |
| BROSMA 2 | 50 |
| LONGA 2 | 24 |
| LONGA 3 | 50 |
| KONGAFISKUR 4 | 8 |
| LÝSINGUR | 5 |
| HÝSA 4 | 1 |

# Nú sleppa útróðrarmenn frá at kryvja

**Stendur tað upp til Sandoy Seafood, so fara teir í næstum at taka í móti ókruvdum, blóðgaðum og niðurkøldur fiski frá útróðrarbátunum, fyri at útnytta innvølin.**

*Jústinus Leivsson Eidesgaard*

Framtíðin verður kanska eitt sindur lættari hjá útróðrarmonnum, ella verða tað færri menn við útróðrarbátunum, verður ein ætlan, sum Sandoy Seafood, Kósin, Faroe Seafood og Heilsufrøðiliga Starvsstovan fyrireika, veruleiki.

Í dag verður innvølurin vanliga tveittur út aftur. Bara rognini verða tikin og tey hava sera góðan prís í dag. Men pengar kunnu vinnast burtur úr maganum, úr livrini og øðrum í innvølunum, er hesin feskur og daggamal. Tí er útróðrarfiskurin upplagdur í nýggju ætlanini.

– Ætlanin er, at útróðrarmenninir einans skula blóðga og goyma fiskin í ísvatni. Vit skulu kryvja fiskin á landi fyri at fáa mest møguligt burturúr innvølunum, segði Egil Olsen á fundi á Fiskirannsóknarstovuni í gjár, har úrslitið av fiskirannsóknunum fyri í fjør varð lagt fram.

### Marknaðurin er longu til

Tað sum er hugaligt við nýggju ætlanini er, at menn skulu ikki út at leita eftir einum nýggjum marknaði. Góður marknaður er longu fyri ætlaðu úrdráttunum.

– Ætlanin umfatar at gagnnýta livur, rogn, sil og magar og her er longu ein konkretur marknaður.Vit velja útróðrarfisk, tí góðskan hevur alt at siga fyri innvøl. Fiskurin verður betri, um útróðrarmaðurin sleppur frá at kryvja. Hann verður niðurkøldur so hvørt sum hann kemur á dekkið og liggur í kuldanum til hann verður landaður. Útróðrarfiskur hevur í dag ójavna góðsku. Teir sum ansa best eftir og køla so skjótt sum gjørligt hava bestu góðskuna. Verður fiskurin køldur beinanvegin uttan af verða kruvdur, so verður góðskan javnari og betri, segði Egil Olsen, Sandoy Seafood.

– Rávørukostnaðurin hjá einum virki er 75 prosent av útreiðslunum, tí snýr tað seg um at fáa mest møguligt burturúr rávøruni og tað kunnu vit við at virkini kryvja útróðrarfiskin sjálvir, sigur Egil Olsen.

Livurin skal nýtast til lýsi og eisini niðursjóast. Rogn kann nýtast til niðursjóing og verða pakkað í gløs sum kaviar. Maganir kunnu nýtast til proteinframleiðslu, sum kann nýtast til mangt og hvat.



# Fiskivinnan tørvar granskarar

*Jústinus Leivsson Eidesgaard*



– Gransking er vitan og vitan er framtíðin innan fiskivinnu. Vitan er alt og eitt í dag. Vit føroyingar kunnu ikki rokna við art fáa vitan frá granskarum úti í heimi, um vit ikki koma við nøkrum sjálvir. Vit mugu hava granskarar, sum burturav arbeiða við at granska táttir innan okkara høvuðsvinnu og tá hava vit nakað at bjóða mótvegis útlendingum, skulu vit eisini fáa vitan frá teimum, sigur Hjalti í Jákupstovu, stjóri á Fiskirannsóknarstovuni.

Allan gjár var fundur millum fiskirannsóknarstovuna og vinnuna. Fundurin var hildin í Noatúni og gekk undir heitinum Fiskiroyndir í ár 2000 og í tær ætlaðu í verandi ári. Nógv fólk vóru møtt fyri vinnuna og sera áhugavert var at hoyra um fiskiroyndirnar, sum eru gjørdar í farna ári og tær sum eru og fara í gongd í ár.

Ein niðurstøða á fundinum var, at meira samskipan má til millum fiskiflota, vinnu á landi, fiskirannsóknarstovu og menningarstovu. Skotið er upp at seta ein granskingarstovn á stovn í Føroyum, har granskarar vera settir at granska á øllum økjum innan fiskivinnu.

# Brimil kemur klokkan tvey

Klokkan tvey í dag kemur Brimil á Havnina. Havnar Hornorkestur stendur á kaiini og tekur móti okkara nýggja vaktarskipi, sum hevur havt so ilt við at koma til landið. Móttøka verður umborð og fiskimálaráðharrin Jørgin Niclasen vónar, at nógv fara at nýta høvi til at síggja hetta stásiliga skip.

**je**

# Vita einki um havtaskuna

*Jústinus Leivsson Eidesgaard*

Í dag verða veidd millum 2000-2500 tons av havtasku undir Føroyum. Hendan verður seld fyri umleið 40 krónur kiloið, men veruleikin er tann, at føroyingar vita lítið og einki um stovnin undir Føroyum og hvussu nógv hann tolir.

– Vit mugu fara at kanna havtaskustovnin betri. Hetta er ein lønandi vinna og tað hevði verið ómetaligt spell, um vit ovurveiddu stovnin. Vit vita ikki um stovnurin undir Føroyum er ein sjálvstøðugur stovnur, ella um hann er ein partur av stovninum í Hetlandi ella partur av stovninum á Hatton Bank, segði Hjalti í Jákupstovu, tá hann á fundi á Fiskirannsóknarstovuni umræddi ætlaninar fyri fiskirannsóknum í ár.

– Vit ætla eisini at halda fram við at kanna hvussu rist riggar í flatfiskatrolum. Vit trúgva at tað fer at bera til við rist í flatfiskatrolum, soleiðis at trolbátarnir fiska flatfisk í staðin fyri tosk. Royndirnar vit gjørdu í fjør vóru eisini lovandi, sigur Hjalti í Jákupstovu.



*Vinnan var væl umboðað tá ið Fiskirannsóknarstovan greiddi frá fiskiroyndunum í farna og komandi ári*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Farpack ISO góðkent

*Jústinus Leivsson Eidesgaard*

Fríggjadagurin var ein stórur dagur hjá fyritøkuni Farpack á Staravegi í Havn. Tá bjóðaði felagið til móttøku, tí felagið nú hevur fingið DS/EB ISO 9001-2000 góðkenning innan innkeyp, marknaðarføring, sølu, flutning av pakningi og øðrum tilhoyri til fiskivinnuna og aðra vinnu. Hendan góðkenning er trygd fyri at fyrirtøkan lýkur hægstu krøv fyri góðskueftirliti av øllum tænastum fyritøkan bjóðar.




• **Góð útbúgving á Miðnámsskúlanum !**

- *Tað er nú, tú skal taka avgerð um at fara undir eitt nýtt skeið í tínum lívi*
- **studentaskúlin** fyrireikar teg væl til framtíðina !
- *Skúlin er ein alment mennandi skúli, sum gevur førleika á nógvum økjum*
- **studentsprógvið** - eisini sum stakgreinalesandi – er eitt dygdargott prógv, sum gevur nógvar møguleikar
- *Skúlin er hugnaligur - og her fær tú nógvar góðar vinir !*
- *Tilkomin kunnu taka prógv í stakgreinum*
- Ring á tlf. 373622 ella 374011

**Miðnámsskúlin**

***– Tann lítli skúlin við teim stóru møguleikunum !***

Tlf. 374011 ella 371001 · Teldupostur: midnam@midnam.fo · Heimasíða: www.midnam.fo